Kommunufelagið

Dagfesting
27. september 2016

Okkara j.nr.
Click here to enter text.

Málsviðgeri
Jóhan J. Lamhauge

Tygara j.nr. 16/00513

Uttanríkis- og Vinnumálaráðið
Tinganes
Boks 377
110 Tórshavn

**Viðv.: uppskoti til Heimaframleiðslukunngerð**

Kommunufelagið hevur fingið omanfyri nevndu kunngerð til hoyringar, og hevur fylgjandi at viðmerkja til uppskotið:

Kommunufelagið fegnast yvirskipað um, at tað við kunngerðini verður lagt upp til, at tað virksemið við heimaframleiðslu, ið fer fram í lokalsamfeløgunum, í ávísan mun kann halda fram, uttan alt ov formalistisk krøv.

Í § 4 í uppskotinum er ásett, at treytin fyri at vera skrásettur sum heimaframleiðari er m.a., *"...at samlaði árligi umsetningurin er minni enn kr. 200.000,-."*

Til hetta er fyri tað fyrsta at viðmerkja, at tað eigur at verða tilskilað, at árligi umsetingurin er uttan mvg, so hetta ikki gerst eitt ivamál.

Ongar viðmerkingar eru til kunngerðina, og tí er okkum ógreitt, hvussu komið er fram til, at kr. 200.000,- er rætt og hóskandi mark fyri, nær ein framleiðari er at meta sum heimaframleiðari ella ikki.

Sum skilst, er systematikkurin tann, at er árligi umsetningurin omanfyri kr. 200.000,-, so verður framleiðarin fevndur av kravinum um løggilding og skráseting.

Tað kann tykjast løgið, at tann sum umsetur fyri kr. 199.000,- ikki skal løggildast, meðan tann, ið selur fyri 2 krónur meira, skal løggildast.

Sjálvsagt kann argumenterast fyri, at um ein framleiðari hevur umsetning á meira enn kr. 200.000,-, so er eitt ávíst vinnuligt element í virkseminum. Løggilding er eisini ein ábending um, at farið verður frá heimaframleiðslu til vinnuligt virksemi. Hinvegin má eisini havast í huga, at við einum umsetningi uppá kr. 200.000,-, kann neyvan roknast við, at nakað avlop er til at fara undir eina kostnaðarmikla íløgu, sum ein løggildingartilgongd kann vera, og tí kann hetta avgjørda markið blíva ein beinleiðis forðing fyri, at ein framleiðari tekur eitt annars ætlað stig at flyta seg frá heimaframleiðslu móti eini vinnuligari framleiðslu.

Markið fyri, nær talan er um vinnuliga framleiðslu, má tí taka støði í eini generellari meting av, nær vinnuvirksemi innan tílíka framleiðslu er lønsamt, og at tað í tilgongdini frá

**R. C. Effersøesgøta 30 · FO-100 Tórshavn**

**Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo**

heimaframleiðslu til vinnuliga framleiðslu, eisini er fíggjarligt rásarúm og á annan hátt rásarúm fyri, at løggilding og tær mannagongdir, ið hartil hoyra, eru ein nátturligur partur av avgerðini hjá einum framleiðara at flyta seg frá heimaframleiðslu til vinnuliga framleiðslu.

Vit hava ikki førleikar at meta um, hvar eitt tílíkt mark skuldi ligið, men greitt er tó, at hetta markið helst eigur at liggja nakað væl omanfyri tað mark á kr. 200.000,-, ið nú er í uppskoti.

Avgjørda markið á kr. 200.000,- kann eisini hava aðrar óhepnar avleiðingar, soleiðis at ein framleiðari, sum hevur ein umsetning, sum liggur um markið, kann hugsast, tilvitað, at fara at halda seg undir markinum, og kann hetta forða fyri menning og framburði í landbúnaðinum, hetta ikki tí, at løggilding sum so ikki er ynskilig, men tí at møguligi meirkostnaðurin av at uppfylla afturatkomandi løggildingarkrøv, ikki stendur mát við (økta) umsetningin.

Harnæst, um hugt verður eftir § 1 stk. 2 sæst, at vørurnar, ið eru fevndar av kunngerðini, eru *"...seyða- og neytakjøt, undir hesum eisini avroð, hara og villini fuglur."* Tá havt verður í huga, at rákið nú í longri tíð hevur verið, at vit eiga at fáa sum frægast burturúr nátturutilfeinginum, so kann eitt ov lágt mark blíva ein forðing fyri, at alt tilfeingið, hóast eyka stríð, kemur til høldar og verður selt, t.d. avroð, tí tað telur við í samlaða umsetninginum, ið liggur til grund fyri, um ein framleiðari kemur undir kravið um løggilding.

Við omanfyri standandi í huga, verður heitt á Uttanríkis- og Vinnumálaráðið um at umhugsa av nýggjum, hvørt markið á kr. 200.000,- er hóskandi.

Í aðrar mátar hava vit ikki viðmerkingar til kunngerðina.

Vegna
Kommunufelagið

Heðin Mortensen
Formaður

Eyðun Christiansen
Stjóri

**R. C. Effersøesgøta 30 · FO-100 Tórshavn**

**Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo**